Ógrundaðir og óforskammaðir spurningar?

Lesarabrævið niðanfyri stóð í 14. September leygardagin undir dulnevninum i.e. Tá viðkomandi var á 14. September við brævinum í farnu viku, fekk hon at vita, at tað skuldi fáa pláss sum onnur lesarabrøv. Men veruleikin varð so tann, at hetta eina lesarabrævið varð sett við smæstu skriftini, sum finst, og er tí nærum ólesiligt fyri flest øll fólk.

Inga Ellingsgaard, sum hevur skrivað brævið, hevur sett seg í samband við Sosialin og biðið okkum prentað lesarabrævið í vanligari stødd. Hon heldur tað vera løgið at seta slíkt lesarabræv við so smáum stavum, at eingin kann lesa tað. Tá átti brævið ikki at verið komið í 14. September.

Blaðstj.

Í oddagreinini í 14. September nr. 3, 11.1.89, verður sagt frá, at blaðstjórin á Sosialinum í oddagrein síni leygardagin 7.1.89 spyr:

»Hvat Tjóðveldisflokkurin ætlar at gera við friðarspurningin, umhvørvismálini og kvinnumálini — og hvussu við sosiala rættvísinum?«

So spyr blaðstjórin á 14. September: »Hvat siga tjóðveldisfólk til hesar ógrundaðu og óforskammaðu spurningar Sosialsins?«.

Eg siti sum kánus. — Alvaratos. Vit eru mong tjóðveldisfólk, sum í hesum døgum júst seta okkum hesar somu spurningar, eftir at Signar Hansen og fleiri við honum, eru sinnað at fara í samgongu við Fólkaflokkin, tí hvat so við júst omanfyri nevndu spurningum?

Og hvat við javnstøðulógini?

Slíkir spurningar skulu setast flokki okkara uttan at verða skirdir ógrundaðir og óforskammaðir.

Á fundinum í Norðurlandahúsinum, sum varð sjónvarpaður, segði Finnbogi Ísakson, at Tjóðveldisflokkurin líka so fegin vildi samstarvið við Fólkaflokkin við Óla Breckmann á odda sum við Javnaðarflokkin við Atla Dam á odda. Eg veit um fólk, sum ætlaðu at atkvøða fyri Finnboga, men sum atkvøddu fyri øðrum fólki í flokkinum istaðin.

Sjálv var eg í iva. Stóð flokkurin aftanfyri tað, Finnbogi segði, ella var hetta fyri hansara egnu rokning? (Kom í hesum sambandi at hugsa um, hvussu ofta spurt hevur verið um Dagblaðsskrivingina: Er hatta Fólkaflokkurin ella Óli Breckmann? Eri síðani sannført um, at stórur partur er Fólkaflokkurin og ikki bara Óli Breckmann).

Eg og húski mitt atkvøddu tó øll fyri Karini Kjølbro, júst tí hennara støða er so greið í áður nevndu spurningum (Gævi hon hevði leitt samráðingarnar fyri flokkin).

Eftir valið hevði hon hug at taka Namibia spurningin upp aftur til viðgerðar. Hvat hendir? Jú, Signar Hansen er á sjónvarpsskerminum í øðini inn á Karina, at hon kann finna uppá slíkt. Hvat skeivt var í hesum? Eg helt, at Tjóðveldisflokkurin hevði greiða støðu í hesum máli; — eg havi helst misskilt okkurt.

Eitt er heilt greitt fyri mítt viðkomandi (og eg standi so langt ifrá einsamøll):

Fer mín atkvøða til eitt fólkaflokssamstarv, so sigi eg (og fleiri við mær) Tjóðveldisflokkinum farvæl, sjálvt um Karin Kjølbro stendur á listanum eitt annað val. So heldur Javnaðarflokkin, sum greitt sigur seg ikki vilja hava nakað við Fólkaflokkin at gera.

Inga Ellingsgaard



Lesarin skrivar:

»Hoyrið foss á klettum spæla....«

Okkum er sent:

Oyggjatíðindi luktar

Man Dan Klein — av óvart hava gloypt Hilmar Kass ella Atla Dam

Ógrundaðir og óforskammaðir spurningar?

Nógvir veljarar venda nú tjóðveldisflokkinum bakið

Tjóðveldisflokkurin hevur í hesum landsstýrissamráðingum vassað so langt út í fólkafloksevjuna, at fjold av tjóðveldisveljarum nú venda flokkinum bakið. Ein partur av hesum eru longu nú at síggja á limalistanum hjá javnaðarflokkinum, sigur Kristjan á Neystabø, formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Í blaðnum í dag hevur SSJ saman við SU limalýsing, har fólk kunnu seta sítt navn, og senda lepan inn til SSJ ella SU og sostatt gerast limur í einum ella báðum av hesum felagsskapunum.

Slíkar lýsingar hevur ein sæð fyrr, men neyvan beint eftir eitt løgtingsval, har fólk aloftast eru troytt av politiska strevinum.

Sosialurin hevur spurt formannin í SSJ nærri um, hví hettar verður gjørt júst nú.

Kristjan á Neystabø heldur, at tað man vera langt síðani, at Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, hevur fingið so nógvar nýggjar limir innan fyri eitt so avmarkað tíðarskeið, sum felagið hevur fingið í nýggja árinum. Men fleiri av hesum nýggju kærkomnu limunum hava ikki reiðiliga vitað, hvussu teir skulu bera seg at, fyri at gerast limir í flokkinum, og hava teir tí mest ringt til formannin í felagnum ella til onkran tey kenna í flokkinum. Hetta er sjálvandi framhaldandi møguligt, men kanska onkur heldur vil fylla ein seðil út, og senda hann inn, so hava tey nú eisini møguleika fyri tí.

Hvat er so grundin til, at so nógv tekna seg sum lim júst nú. Til hetta sigur Kristjan á Neystabø, at tað er onki yvir at dylja, at nógv tann størsti parturin — nærum øll — eru onøgdir tjóðveldisveljarar. Fyrrverandi tjóðveldisfólk sum eru imóti at tjóðveldisflokkurin er so ágrýtin eftir at fara í samgongu við fyrst og fremst Fólkaflokkin og kanska partvist eisini Kr. Fólkafl. Hetta er kanska ikki so løgið, leggur Kristjan afturat, tá hugsað verður um, at flokkurin nú hevur givið frá sær nærum øll tjóðskaparmál, og nú ger samgongu saman við fólkaflokkinum. Hetta hevði uttan iva stórur partur av veljarafjøld tjóðveldisfloksins ikki droymt um, tá tey settu krossin fyri nú gott 2 mánaðum síðan.

FJARÐA-HÚS
— eini frálík hús

MOPA
— ein verumáti allar ársins 12 mánaðar



Utferðir, stuttleikafiskiskap og aðra veiðu.
MOPA II longd: 5,25 m, breidd: 1,60 m, hædd í húsinum: 80 cm.
MOPA Sprint longd: 5,40, breidd: 1,60 m, hædd í húsinum: 95 cm.
SKIBBY CYKLER & BÅDE ApS
Hovedgaden 49 • 4050 Skibby
Tlf. (02) 32 73 31 og (02) 32 80 06
svarar eisini um kvøldið